# 10. floksnæmingar gera ungdómssendingar

Hvørt mánakvøld og hóskvøld er ein ungdómssending í Rás 2, sum nevnist Highway 83. Tað eru 10. floksnæmingar, sum ganga á miðlabreytini í Eysturskúlanum, sum standa fyri sendingunum

**JONHARD HAMMER**

Tendrarar tú útvarpstóli› mánakvøld klokkan fimtan minuttir yvir seks, ella hóskvøld klokkan sjey, og stillar inn á FM 102 Mhz, hoyrir tú ungdómssendingina Highway 83 fara í luftina. Sendingin er ein li›ur í skúlagongdini hjá stívliga 20 næmingum, sum hvønn mánadag og t‡sdag bert ta› einu lærugreinina á timatalvuni, nevnliga mi›labreyt.

## Nógvar breytir eru

Seinastu tvey skúlaárini hevur ta› veri› skipa› solei›is, at næmingar, i› fara í 10. flokk, skulu velja sær eina breyt at ganga á. Hetta merkir, at hesir næmingar tveir dagar um vikuna bert hava breyt og einki anna› á timatalvuni. Nógvar breytir eru at velja ímillum. Nevnast kunnu umframt mi›labreytina, eitt nú náttúrubreytin, ítróttarbreytin, húsarhaldsbreytin, sjóvinnnubreytin, vinnulívsbreytin og listabreytin. Fyri at so nógvar breytir sum gjørligt skulu vera, samskipa skúlarnir í høvu›ssta›num um breytirnar. Ta› merkir, at til dømis á mi›labreytini í Eysturskúlanum ganga næmingar bæ›i úr Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, umframt næmingar úr Eysturskúlanum sjálvandi.

Ta› vísir seg eisini, at hetta dámar næmingunum stak væl, og tá i› so nógvar breytir eru at velja ímillum, er lættari hjá teimum at finna okkurt, sum hevur teirra áhuga.

## Arbei›a vi› mi›lum burturav

Næmingarnir, sum ganga á mi›labreyt, arbei›a vi› mi›lum burturav. Teir hava arbeitt vi› journalistikki; hvat er journalistikkur, hvat kann man loyva sær sum journalist, hvar gongur marki› og so framvegis. Somulei›is hava tey vitja› hjá onkrum mi›lum.

Sambært lærarunum á mi›labreytini skulu næmingarnir eisini á›renn summarfrí›ina, og ætlanin er, at tey skulu út í praktik hjá ymiskum fyritøkum, sum arbei›a innan mi›laheimin. Ta› ver›a so blø›, útvarp, sjónvarp og l‡singarvirkir.

## Standa sjálvi fyri øllum innihaldinum

Sí›ani ársskifti› hava næmingarnir á mi›labreytini í Eysturskúlanum arbeitt vi› at gera nakrar ungdómssendingar til Rás 2, har tey sjálvi standa fyri øllum innihaldinum í sendingunum. Teir gott og væl 20 næmingarnir hava b‡tt seg í bólkar, sum sí›ani hava sta›i› fyri teimum einstøku sendingunum.

Tilsamans eru fimm næmingabólkar, og hetta hevur helst ført vi› sær, at sendingarnar ikki hava veri› so líkar. Millum ta›, sum hevur veri› vi›gjørd í Highway 83, er eitt nú ungar føroyskar gentur, sum umvegis eitt íslendskt modellvirki, arbei›a sum modellir. Onkur kendur ungur persónur hevur veri› í brennideplinum, og haraftrat hevur ein beinlei›is spurnarkapping, har lurtararnir kunnu vera vi›, veri› í fleiri av sendingunum. Leygarmorgunin hev›i Highway 83 so eina eykasending, har teir fingu vitjan av sjálvum Creamy í útvarpsstovuni.

Allar Highway 83 sendingarnar ver›a sendar beinlei›is, og hetta hevur vi› sær, at ta› er ikki bert í skúlatí›ini, at næmingarnir arbei›a vi› sendingunum. Tey n‡ta eisini ta tí›, tá i› sendingin er í luftini, og harumframt fer eisini nógv onnur frítí› til sendingarnar, men lærararnir siga vi› Sosialin, at hetta hava næmingarnir ikki havt nakrar atfinningar um higartil.

## Manglar okkurt til okkara aldursbólk

Næmingarnir á mi›labreytini siga, at hjá teimum er ta› ógvuliga áhugavert og vi›komandi at gera slíkar sendingar. Tey siga, at ta› er stórur tørvur á eini útvarps- ella sjónvarpssending, sum er ætla› teirra aldursbólki, ta› vil siga 14-17 ár, og tey vóna, at Highway 83 sendingarnar koma at halda fram, eisini tá i› tey eru li›ug vi› sína skúlagongd. Um hetta ikki ber til, so vóna tey, at onkur annar mi›il fær áhuga fyri at gera okkurt, sum er ætla› júst hesum aldursbólki.

Ta› er einki at ivast í, at hesin aldursbólkurin í nógvum førum dettur burtur ímillum. Um vit til dømis taka dansivi›urskiftini í høvu›ssta›num, so er einki dansista›, i› hevur til dømis hevur diskotek einafer› um vikuna fyri teimum, men ísta›in noy›ast tey at taka til takkar vi› at fara í dans í onkrari kaldari høll, tá i› okkurt áhugafelag hevur tørv á peningi og tískil skipar fyri einum dansitiltaki.

## Tíggju sendingar fyri fyrst

Fyribils hava næmingarnir á mi›labreytini í Eysturskúlanum gjørt eina avtalu vi› Rás 2 um, at tey gera tíggju sendingar. Ta› vil siga, at um gó›ar tvær vikur fer tann seinasta sendingin í hesum umfari í luftina, men sum skilst, eru bá›ir partar áhuga›ir í at halda fram vi› samstarvinum á ein ella annan hátt.

Ta› kann vera, at nakrir av næmingunum á mi›labreytini fáa eina áheitan frá Rás 2 um at gera fleiri sendingar, men enn er einki avgjørt. Sjálvir halda næmingarnir, at ta› er stórt spell, um sendingin skuldi fari› í søguna, tí endiliga hevur teirra aldursbólkur fingi› rúm í fjølmi›lunum, og tí er ikki at halda møguleika frá sær aftur, halda tey.

Næmingarnir siga, at ta› er bara at gera nyttu av møguleikanum, um hann er har, tí tey kunnu ikki vænta, at onnur fara at gera alt møguligt fyri tey, me›an tey bara sita og taka ímóti. Ta› er ikki at smæ›ast, men bara at fara ígongd, siga tey at enda.